# Sosialurin gongur ikki ørindi fyri nakran, Álvur Danielsen

KÁRI MIKKELSEN
redaktiónsleiðari og journalistur



Í eini viðmerking mánadagin 2. juli spyr fyrrverandi virkandi álitismaðurin á boðstovuni hjá Postverki Føroya í Havn, Álvur Danielsen, hvørs ørindi Sosialurin gongur? Orsøkin til spurningin er eftir øllum at døma, at blaðið dittar sær at skriva eina grein um tvær kvinnur, ið skýra Postfelag Føroya fyri at taka tær sum gíslar. Hesar uppliva nevniliga, at teirra egna fakfelag bert røkir áhugamálini hjá postboðunum, sum telja væl minni enn helvtina av limaskaranum í felagnum.

Álvur Danielsen fílist á, at blaðið ongantíð hevur verið inni á gólvinum hjá Postfelagnum; ei heldur sett andlit á nakran av teimum 15 starvsfólkunum á Postverkinum, ið fingu »asnasparkið«, sum hann tekur til.

Her bilar minnið hjá tær, Álvur Danielsen, tí sjálvur hevur tú 26. juni upptraðkað í Sosialinum sum fráfarandi formaður í Føroya Filatelistfelag av somu orsøk, sambært tær sjálvum.

Tú skírir meg fyri ikki at siga allan sannleikan um samrøðu mína við forkvinnuna í Føroya Postfelag, ið bað meg ringja til næstformannin í felagnum. Orsøkin til hetta var, at hon var so nýggj og tí ikki kundi svara fyri øllum tí, sum var hent í sambandi við eina uppsøgn fyri trimum árum síðani. Sambært somu kvinnum hoyrdist tá so at siga onki til Postfelagið í sambandi við uppsagnir av níggju fólkum, har talan í flestu førum var um kvinnur inni í húsinum.

Nú er tað soleiðis, at tað altíð er tann, sum myndar eitt felag, vit sum tíðindafólk eiga venda okkum til, og tað ger ein formaður ella forkvinna nú einaferð. Næstformaðurin ella næstforkvinnan kemur bert upp á tal, um vit ikki fáa fatur á fyrrnevnda. Tað gjørdi eg í hesum føri, og tí vóru tað hennara viðmerkingar, ið komu í blaðið. Sum tíðindafólk er tað ikki okkara uppgáva at leita eina keldu upp longri niðri í rekkjuni við tí »røttu« meiningini, tí so gjørdu vit ikki annað (harafturat arbeiða vit sum kunnugt við deadlines, ið skulu haldast). Hetta eigur tann, sum myndar eitt felag, stovn ella fyritøku at kunna svara uppá. Annars situr viðkomandi á skeivum staði.

At vit so ikki áttu eina mynd av forkvinnuni í Postfelag Føroya at seta í blaðið saman við viðmerkingum hennara, hevur heldur onki við dekningin av málunum at gera. Hvussu í allari víðu verð skuldi ein mynd hjálpt upp á tað, sum hon sigur?

Álvur Danielsen kemur eisini við øðrum pástandum, sum eg kann afturvísa. Til dømis at »Sosialurin ikki so frætt megnaði at seta í blaðið tíðindaskriv frá Føroya Postfelag – væl at merkja í fullum líki«.

Men, góði Álvur. Hetta er heldur ikki rætt. Vit prentaðu eitt heilt tíðindaskriv frá Føroya Postfelag 15. juni. Harafturat prentaðu vit eina yvirlýsing frá fýra øðrum fagfeløgum 20. juni.

Hinvegin hevur ongantíð per automatikk verið rætturin hjá nøkrum at fáa eitt heilt tíðindaskriv í blaðið. Hevði tú bara vitað, hvussu nógv vit fáa sendandi av longum, keðiligum ella óviðkomandi tíðindaskrivum (tað sigi eg nú ikki, at tykkara var), so kundu vit gjørt uppaftur fleiri bløð um vikuna, men ístaðin mist nógvar lesarar. Nei, vit gera oftani ístaðin tað, at vit taka tað mest viðkomandi úr tíðindaskrivinum, og seta hetta í blaðið. Meiri hevur lesarin so at siga ikki brúk fyri at vita. Í veruleikanum er talan um at gera avsendaranum eina tænastu, tí sum fjølmiðlafólk hava við lært at leggja dent á tað týdningamiklasta í einum boðskapi og lúka restina burtur. Ongin orsøk er at troytta lesaran meiri enn hægst neyðugt. Tað fari eg heldur ikki at gera í hesum føri, og vil tí enda, sjálvt um Álvur Danielsen eisini kemur við øðrum atfinningum móti Sosialinum, ið eisini kunnu afturvísast.

Tó vil eg siga, at tað frøir meg, at sami Álvur Danielsen kallar meg »annars fryntliga journalistin Kára«, tí fryntligan haldi eg meg eisini hava verið í dekninginum av hesum máli. Allir partar eru slopnir til orðanna, sum teir sjálvandi eiga at gera í einumhvørjum máli, ið verður tikið upp í fjølmiðlunum.

P.S. Orsøkin til seinkaða svarið er, at eg júst eri afturkomin úr feriu uttanlands.


14 VIÐMERKINGAR Sosialurin
Hvønn gangur Sosialurin ørindi fyri ?

# Nú fekk Høgni aftur ilt í búkin!

JOHAN PETERSEN



Herfyri var eitt øgiligt uppstandilsi, tí nakrir næmingar á Tekniska Skúla í Tórshavn skuldu tosa danskt til eina próvtøku. Men so kom ein íslendingur og segði, at tað bilti onki og so hoyrdu vit ikki meira til tað málið. Og nú, oyggjaleikirnir vóru á Rhodos og ein hotellstjóri manglaði eina flaggstong, men var so snildur, at hann vant danska og føroyska flaggið á somu stong, bleiv alt blást upp til eina gølu. Bæði málini væl hjálpt av republic service miðlinum Kringvarpi Føroya.

Tekniski Skúlin í Tórshavn hevur gjørt tað møguligt hjá ungum at lesa til byggi- og framleiðslutøkningar í Føroyum. Men fyri at henda útbúgving kann verða góðkend til víðari lestur uttanlanda og við tað at ongir próvdómarar eru í Føroyum, hevur skúlin gjørt tað einasta rætta, at fáa danskar próvdómarar til at døma avrikið hjá teimu ungu og soleiðis tryggja teimum, at tey kunnu fáa eitt prógv, sum er góðkent uttanlanda til víðari lestur.

**Ein fyrimunur at tosa danskt**

Men hesin møguleikin, sum tey ungu fáa, fall ikki í góða jørð hjá Høgna Hoydal, tí tey máttu tosa danskt til próvtøkuna. Hann vildi heldur, at tey skuldu tosa føroyskt til próvtøkuna og so ikki kunna nýta prógvið til víðari lestur!

Men júst tað, at tosast skuldi danskt, kann bert hava verið ein fyrimunur, tí soleiðis hava tey ungu fyrireikað seg til at kunna nýta prógvið til víðari lestur, har tað onki hjálpir at tosa føroyskt! Men tá ið ein íslendingur segði júst hetta, hoyrdu vit ikki meiri til hetta málið!

**Føroyska og danska flaggið javntmett**

Og so blivu oyggjaleikirnir hildnir á Rhodos. Har manglaði ein flaggstong á einum hotelli. Heldur enn ikki at flagga við føroyskum flaggi, vant hotellstjórin bæði føroyska og danska flaggið á somu stong. Sera snilt! Við hesum janvtstillaði hann føroyska og danska flaggið.

Men heldur ikki hetta toldi Høgni - hann fekk aftur ilt í búkin og reisti málið sum stórmál við fyrispurningi á Fólkatingi. Onkur miðil fekk tað til, at danski ambassadørurin á Rhodos hevði givið boð um hetta. Fyri tað fyrsta er ongin danskur ambassadørur á Rhodos, har kann hægst vera ein konsul. Og fyri tað næsta er avsannað, at nakar danskur myndugleiki hevur nakað við hesa "flaggølu" at gera. Men Høgni framtúrar í síni nationalu fávitsku, væl hjálptur at republic service miðlinum Kringvarpi Føroya.

**Føroysir journalista lítið at sær komnir**

Tað er skelkandi at lesa, hoyra og síggja føroysku miðlarnar ganga sneisaørindi fyri Høgna Hoydal og Tjóðveldisflokkin. Tað er neyvan dagur, at Høgni ella onkur annar tjóðveldismaður ella -kvinna ikki er at hoyra ella síggja í Kringvarpinum, har tey fáa ókeypis mikrofon uttan at nakar kritiskur spurningur verður settur. Føroysku journalistarnir áttu at verið so mikið at sær komnir, at teir eisini vístu kritiska framferð mótvegis Tjóðveldisflokkinum!

Og tíðindi úr Damark. Nær hoyrir tú nakað gott? Bert negativ tíðindi úr Danmark!

DEKKMASTER.FO Fastir, lágir prísir
Bílig og góð dekk til persónbilar, vøruvognar & jeepar ...eisini øll tey kendu
...tá ið prísurin eisini er avgerandi!


Fyri settið 9.990,-
18" BMW New 3
Við 225/40-18 dekkum
Original-look felgur til BMW 3-røðina við 225/40-18 dekkum. Felgurnar verða latnar við boltum og BMW-búmerkjum.


Fyri settið 12.900,-
19" Boston
Við 235/35-19 dekkum
Fantastiska flottar felgur í hypersilver. Á goymslu í 5x112 til VW, Audi, Seat.


18" New RS4
Við 225/40-18 dekkum
Original-look felgur til VW/Audi við 225/40-18 dekkum. Felgurnar verða latnar við boltum og VW/Audi-búmerkjum.
Fyri settið 10.800,-

Summardekk á goymslu:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 175/70-13 økonomidekk | 540,- | 205/55-16 økonomidekk | 890,- |
| 175/65-14 økonomidekk | 620,- | 205/55-16 Michelin Primacy | 1.290,- |
| 185/60-14 økonomidekk | 675,- | 205/40-17 økonomidekk | 965,- |
| 185/65-14 Bridgestone B250 | 690,- | 225/45-17 økonomidekk | 995,- |
| 195/50-15 Bridgestone ER300 | 790,- | 225/45-17 Bridgestone ER300 | 1.525,- |
| 195/65-15 økonomidekk | 795,- | 225/40-18 økonomidekk | 1.290,- |
| 195/65-15 Goodyear Excellence | 910,- | 225/40-18 Continental Sp. Con. | 1.890,- |

Send ein teldupost ella ring og hoyr nærri um júst tíni dekk!
www.dekkmaster.fo · info@dekkmaster.fo · telefon 227 000